# EFTA: Meira fæst burturúr samsta



Skulu Ísland og Føroyar knýtast tættari umvegis EFTA?

*Bogi Eliasen*



### Hvat er EFTA

The European Free Trade Association (EFTA) er eitt fríhandilsøki við londunum Sveis, Ísland, Noreg og Liktenstein. Talan er um tey fýra frælsini, vørur, tænastur, kapital og persónar. Ísland, Noreg og Liktenstein eru harumframt partur av EBS samstarvinum, sum umfatar hesi trý londini og tey 25 ES londini. EFTA leggur eisini stóran dent á fríhandilssáttmálar við triðjalond, og á heimasíðuni stendur, at EFTA londini hava tollfrælsi til marknaðir við 756 millónum íbúgvum.

### Stovnanin

Efta bleiv stovnað 4. januar 1960 við Stokholm Sáttmálanum. Høvuðsendamálið var fríur handil ímillum limalondini. Í fyrsta umfarið var tað ídnaðarvørur og síðan landbúnaðar og fiskavørur.

Stovnandi limalondini vóru Eysturríki, Danmark, Noreg, Portugal, Svøríki, Sveis og Bretland. Í 1961 kemur Finnland við sum atlimur (fær fullan limaskap í 1986), 1970 kemur Ísland uppí. Í 1972 fara Bretland og Danmark úr EFTA og í EF og í 1985 fer Portugal sama veg. Likstenstein gerst limur í 1991. Í 1995 var Eysturríki, Finland og Svøríki úr EFTA og uppí ES

### EBS

Í sjeytiárunum bleiv hugt meira at EF og fríðhandilsøkir stovnað við tvílanda fríhandislsáttmálum. Hetta samstarv bleiv umfatandi og í 1994 blev EBS samstarvið sett á stovn milum ES og EFTA londin iNoreg, Ísland og Likstenstein. Í 2002 kom sonevndi Vaduz sáttmálin, sum avloysti Stokholmsáttmálan. Hetta var neyðugt, tí Sveis ikki var limur í EBS samstarvinum, soleiðis at samstarvið bleiv eins umfatandi við Sveis.

### Føroyar og handilssátmálar

Ísland og Føroyar fara í dag at undirrita fríhandilssáttmála, og letur hetta upp møguleikan fyri frælsari samstarvi við Ísland. Vit hava eisini ein fríhandilssáttmála við Russland, sum bert manglar tað síðsta, og síðan er tað nógv umrødda samstarvið um alevropeiska upprunaøkið (kumuleringsskipanin), sum vónandi kemur skjótt. Føroyar hava ídag handilssáttmálar vid Sveis, Noreg, Ísland og ES. Talan er sostatt um, at vit eru við at lata okkum upp, men møguliga at tað gongur nakað seint.

### EFTA og Handilssáttmálar

Ein av orsøkunum til limaskap í ES ella EFTA, er marknaðaratgongd. Tað er lítl ivi um, at ES lima-skapur gevur atgongd til størri marknað, tí tað gevur fría atgongd til marknaðin í limalondunum, eins og tey fáa til okkara, og síðan handilssáttmálarnir ES hevur við triðjalond. EFTA fevnir um færri lond og tí minni marknað, men harafturat hevur EFTA fríhandilssáttmálar við nógv lond kring heimin. Fríhandilssáttmálarnir EFTA hevur, hóska helst betri til føroysk viðurskifti, tí Noreg og Ísland hava lagt dent á at hugsað hevur verið um fiskivinnuna í hesum sáttmálum. Tað hevur ikki verið so dominerandi í sáttmálunum, sum ES hevur gjørt við triðjalond. Ein meting av hvat er best fyri Føroyar, krevur tí eisini eina marknaðarmeting nú, og um hvønn tørv og møguleika vit hava frameftir, og um vit vilja gjalda poltiska prísin fyri limaskap í ES, EFTA ella at standa einsamøll, og sjálvi gera tær avtalur vit meta okkum hava tørv á.

Komið er fram, at Føroyar ikki kunnu gerast limur í EBS, tí Danmark longu er limur umvegis ES limaskapin. Uttanríkispolitisku heimildirnar leggja eisini upp til, at Ríkið bert kann verða umboðað einaferð. Men uttanríkispolitisku heimildirnar nokta ikki fyri at brúka aðrar loysnir, har hon ikki er nøktandi. Heimurin er soleiðis í dag, at altjóða samstarv er ein av høvuðlutunum í menning. Tí er tað umráðandi hjá Føroyum at verða partur av altjóða samstarvi. Á málsøkjum, sum ikki eru yvirtikin, verður hetta samstarv røkt av Danmark, men á yvirtiknum málsøkjum er tað okkara egna ábyrgd. Tí er tað logiskt, at um Føroyar hava yvirtikið neyðugu málsøkini, so mátti eisini borið til at verði partur av altjóða samstarvi, tí annars verða vit sett uttanfyri alheimsgerðina. Tað er at meta sum eitt afturhaldsinnað sjónarmið, at Føroyar ikki kann gerast limur í EBS samstarvinum, tí tað er har evropeiska samstarvið er. Hesin spurningurin eigur tí at verða kannaður gjølla, og her er tað talan um samráðingar við danir og møguliga við EBS londini, um meiriluti er fyri at royna at fáa Føroyum limaskap í EBS samstarvinum.

### Hvat er EFTA uttan EBS?

Ísland, Noreg og Likstenstein eru partur av EBS samstarvinum, meðan Sveis ikki er. So tað ber til at verða limur í EFTA uttan at verða partur av EBS samstarvinum. Um Føroyar ikki kunnu verða limir í EBS, er fyrimunurin allíkavæl samtarvið við EFTA londini og atgondina til aðrar marknaðir umvegis fríhandilssáttmálarnar, EFTA hevur við triðjalond.

### Tjóðskapar-spurningurin

Tað tykist at verða politiskt sera torført, at fáa føroyska semju um ES limaskap. Fyrsti spurningurin er um meiriluti er fyri limaskapi og annar spurningurin um meiriluti er fyri limaskapi, sum antin fullveldi ella sum danskur landslutur. Limaskapur sum partur av Danmark, sum helst hevði komið at verið líka sum skipanin Áland hevur í dag, bleiv staðiligа avvístur av øllum flokkunum, tá ráðstevna var um ES herfyri. Sambandsflokkurin hevur tó síðan ført fram, at hann ynskir limaskap í ES sum partur av Danmark, men eingin av hinum flokkunum sær út til at taka undir við hesum.. Tjóðveldisflokkurin hevði helst tikið undir við einum limaskapi í ES sum fullveldi. M.a. Óli Samró hevur í hesum sambandi víst á, at bæði Tjóðveldið og Sambandið vilja limaskap, ósemjan er bara um hvussu, og tað má kunna fáast uppá pláss.

Metingin hiðani er, at tjóðskaparspurningurin fyllur so nógv í ES spurninginum, at tað lættliga kann taka nógv ár at fáa eina semju. EFTA leisturin ber til uttan at tjóðskaparmálið skal avgreiðast, og tí ber til at fara undir tilgongdina beinanvegin, um politiskur meiriluti er fyri. Hendan tilgongdin krevur

### ES limaskapur:

Sum partur av Danmark. Verður tekniskt skipað soleiðis fyri, at danski limaskapurin eisini umfatar Føroyar, eins og tann finski umfatar Áland. Tá Grønland var ES limur, fekk Grønland ein av donsku sessinum í ES-tinginum. Áland hevur ikki sæti í ES-tinginum.

Sum fullveldi
Føroyar skulu sjálvar røkja allar ES skyldur, fær sæti í ES-tinginum, ráðharraráðnum og í ES nevndini.

### EFTA Handilsviðurskifti:

EFTA hevur fríhandilssáttmálar við Bulgaria, Rumenia, Kroatia, Makedonia, Ísrael, Jordan, Libanon, Marokko, Palestina, Tunesia, Turkaland, Kili, Meksiko, Singapor.

Síðan hava EFTA londini tvílanda sáttmálar við ES og Føroyar

Samráðingar.
Samráðst verður um handilssáttmálar við Kanada, Serbia Montenegro, Peru, GCC (The Cooperation Council for Arab States in the Gulf), Mercosur (Brasil, Argentina, Urugvei, Paragvei), Southern African Custom Union (Botswana, Lesotho, Namibia, Suðurafrika og Svasiland)